# Klaksvík sum nýggjur býur



**Nýggja miðbýarætlanini í Klaksvík fekk góða móttøku, tá ið hon varð løgd fram á borgarfundi í Klaksvík í gjárkvøldið. Onkur áhoyrari spurdi, hvar klaksvíkingar skulu drepa grind í framtíðini, og arkitektur fegnaðist um, at gleðir amatørar høvdu gjørt ætlanina**

MIÐBÝUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*
*Myndir: Dávur Winther*

Badmintonhøllin í Klaksvík var full av fólki, tá ið nýggj miðbýarætlan fyri Klaksvík var løgd fram á borgarafundi mikukvøldið. Klaksvíkar kommuna skipaði fyri fundinum.

Fleiri miðbýarætlanir eru gjørdar fyri Klaksvík seinnu árini, men hóast tað hildu Gunnar Nolsøe og Archibald Black, at neyðugt var við einari nýggjari ætlan, sum veruliga kann føra Klaksvík fram í tíðina sum ein nýggjur býur.

Og teirra ætlan er stórsligin. Nýggjar útfyllingar skulu gerast fram við báðum armum á vágni fyri at fáa nýtt lendi at byggja á Og byggjast skal – býarhús, hotell, skúlar, íbúðir, handlar, bátapláss og annað.

- Hugskotið er, at Klaksvíkar kommuna ger eina yvirskipaða ætlan og skapar karmarnar, og so er tað í stóran mun upp til privatar íleggjarar at brúka økini, siga Gunnar Nolsøe og Archibald Black.

Teir hava seinastu tíðina arbeitt saman við Býarplansbólkinum hjá Klaksvíkar kommunu um ætlanina.

### Armarnir knýtast saman

Gunnar Nolsøe segði í sínari framløgu, at fyrra partin av farnu øld vaks fólkatalið í Klaksvík munandi meira enn í restini av Føroyum. Seinna partin av farnu øld vaks Klaksvík tó væl minni enn miðaltalið fyri Føroyar.

Tí førdi hann fram, at neyðugt er við nýggjum ætlanum, nýggjum tankum og nýggjari bygging, so at Klaksvík kann gerast ein meira framrættaður og nýmótans býur við teimum tilboðum, sum fólk vilja hava nú á døgum.

Archibald Black legði sjálvan ætlanina fram. Hann hevur gjørt tekningarnar av nýggja miðbýnum, og tær vóru hugtakandi. Nógv hugskot vóru um, hvussu Klaksvík kann byggjast út, og ein týðandi partur av ætlanini er ein hólmur, sum skal gerast innarliga á vágni. Tvær brúgvar – ein frá hvørjum armi - skulu ganga út á hólmin, og á hólminum

